# Gøtutróndur vekir stoltar kenslur í Danmark

**Gamla áttamannafarið Gøtutróndur, vekir ans í havnini í Hundinge**

Gamlá áttamannafarið, Gøtutróndur, hevur fingið nýggjan heimasjógv.

Vit kenna hann mest frá tí at hann plagdi at rógva kapp á føroyskum firðum og vágum. Men nú er tað í Hundinge í Danmark, at hann báru brýtur.

Tað var fyrr í ár, at gøtumaðurin Halgrím Gregersen ringdi til føroyska bátavinin av øllum á flatlondum, Ólav á Heyum, og bjóðaði honum Gøtutrónd fyri einki, bara teir vildu røkja hann og brúka hann til at gera føroyska bátin kendan.

Gøtutróndur var ikki heilt ókendur í Danmark, tí á eini Færø-regatta 19 árum síðani, læntu tey fýra áttamannafør úr Føroyum og ein teirra var Gøtutróndur.

- Eg varð tikin á bóli av at fáa hetta tilboðið so brádliga eftir 19 ár. Men tað kom væl vil og tað eydnaðist at fáa hann til Danmark við góðum stuðuli frá Tórhalli Thomsen í Norðragøtu og Smyril Line. Og í Danmark fingu tey máling og aðra útgerð frá Tempo Både.

Ólavur á Heygum sigur, at hetta kom serliga væl við, nú tey eru í ferð við at fyrireika eina norðurlendska "ro- og kulturstævne" í Hundinge 11. august næsta ár.



*Hugni í havnini í Hundinge. Gøtutróndur er á veg inn í Havnina og tað er stórur áhugi fyri hesum sermerkta farið, sigur Ólavur á Heygum*

Men Gøtutróndur er longu nú tikin dugliga í brúk, tí hann skal vera við í einum sjónleiki um sjálvan Ormin Langa, sum ein ungdómsskúli er farin at venja og tey venja seg nú dugliga at rógva við føroyska áttamannafarinum.

Men eitt bátafelag í Hundinge rør eisini við bátinum fast einaferð um vikuna.

Gøtutróndur hevur so stóran áhugað har um leiðir, at lokalblaðið Sydkysten, ætlar at skriva greinarrøð um bátin og um víkingar

Ólavur í Heygum sigur, at í Hindinge eru einir 500 bátar, men tað skerst ikki burtur, at Gøtutróndur vekir eisini ein serligan ans hjá fólki.

Tað verður oftað skipað fyri tiltøkum í havnini í Hundinge og tá ið eitt mentannartiltak var seinasta vikuskiftið, var tað ein stórur riðil av fólki, sum steðgaði á at hyggja at Gøtutróndi.

Tá fingu tey eisini eina frágreiðing um navnabretti, at Gøtutróndur stendur í brynju og við svørði í hond.

- Í bátafelagnum, Hundinge Bådeklub, eru vit ikki sørt stolt av eit eina eitt slíkt merkisvert far, sum Gøtutróndur, sigur Ólavur á Heygum

# Leirvíkingar byggja skip fyri 165 milliónir

**Justinussen maður í Leirvík er upp í oljuvinnuna við nýggjum skipi um sløk tvey árar**

Um sløk tvey ár kemur eitt nýtt oljuveitingarskip í føroyska flotan.

Tað er eitt felag í Leirvík, við Tummas Justinussen á odda, sum stendur aftanfyri ætlanina

Men tað er Føroya Sparikassi, sum stendur á odda fyri fíggjarsamtakin um, ið fíggjar byggingina av skipinum, sum eisini verður skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS.

Sparikassin sigur á heimasíðu síni, at skipið verður væntandi liðugt á vári í 2008. Sáttmálin er akkurát skrivaður og skipið skal byggjast á Solstrand skipasmiðjuni í Noregi.

Talan er um eitt skip, ið er 74,9 metrar langt og 16,4 metrar breitt.

Skipið kostar 180 milliónar norskar krónur ella góðar 165 milliónir danskar krónur. Umframt Føroya Sparikassa, ið leiðir fíggjarsamtakið, sum fíggjar verkætlanina, eru Føroya Banki og Føroya Realkredittstovnur við í fíggingini

- At fara inn í frálandavinnuna er eitt náttúrligt framhald í menningini av okkara virksemi og helst eisini ein góð mótvekt til fiskiskapin, ið fyllir mest hjá okkum, sigur Tummas Justinussen við heimasíðuna hjá sparikassanum.

Annars er Tummas Justinussen eisini høvuðsmaður í felagnum Sjóborg, ið hevur fimm skip í flotanum.

Seinnu árini hava Justinussen-menninir, ið eru vælkendir í føroyskum vinnulívi, fylgt frálandavinnuni við stórum áhuga, og serliga tvey tey seinastu árini hevur hon kastað væl av sær.

Hann sigur, at enn hava teir onga avtalu um skipið men teir hava góðar vónir, tí eftirspurningurin er stórur.



*Soleiðis sær nýggja skipið hjá leirvíkingum út*

# Helgi Midjord í Ribarhúsi



**Sunnudagin lat Helgi Midjord upp listaframsýning í Fuglafirði**

Sunnudagin lat upp listaframsýning í Ribarhúsi.

Helgi Midjord hevur fleiri ferðir havt listaframsýningar áður og hann hevur eisini verið umboðaður á onkrum ólavsøkuframsýningum.

Á framsýningini hevur hann 15 málningar.

Helgi málar súmbolskar málningar og hugkveikingina fær hann úr stórum og smáum í gerandisfegnum.

Framsýningin hjá honum er opin allan hendan mánaðin og gerandisdagar er opið frá klokkan 15-18.





**Heysttilboð til London**

Galdandi til 30. oktober 2006.

**Flúgv og búgv í London**

Vitja London, eitt satt Eldorado av upplivingum.



**Americana Hotel*****
í miðbýnum við Baker Street

Prísur fyri hvønn í 3 nætur í dupultkamari
Eyka fyri einakamar 1089,-

**3536,-**



**Avni@Courtfield Gardens hotel *****
Cloucester Road

Prísur fyri hvønn í 3 nætur í dupultkamari
Eyka fyri einakamar 726,-

**3604,-**



**Saint Gregory Hotel ******
við Liverpool Street

Prísur fyri hvønn í 3 nætur í dupultkamari
Eyka fyri einakamar 1416,-

**3655,-**

*Íroknað prísirnar er flogferð, gisting við Continental morgunmati, og øll avgjøld.*



**Flúgv og koyr í London**
B-bilur í 3 dagar

Prísur fyri 2 fólk og bil. Íroknað prísin er flogferð fyri 2 fólk, bilaleiga og øll avgjøld.

**5795,-**



**Flúgv til london**
Bara flogferð

Íroknað prísin eru øll avgjøld
(um bílagt verður á atlantic.fo)

Prísir úr: **2186,-**

www.sansir.fo

Meira um London á heimasíðu okkara. Har kunnu tit bóka sangleikir, konsertir, útferðir og flutning frá Stansted inn í býin og útaftur.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum www.atlantic.fo